





















# Ein túr við Johonnu TG 326

**Á jóansøku ber til at hugna sær við at vitja umborð á sluppina Johonnu TG 326 og sunnudagin verður siglt út á Grøninar og kaffi, køkur og harmonikutónleikur fylgja við**

SLUPPHUGNI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sluppin Johanna TG 326 gjørdist landskend, tá vágbingar í áttatiárunum settu sær fyri at seta hana í stand og í evstu løtu at bjarga henni undan at enda í gloymskunnar havi. Alt landið var við og fylgdi við í hesi verkætlan.


*Johanna TG 326*

Johanna liggur enn við bryggju í Vági, um enn tað ikki hoyrist so nógv frá henni í dag. Men har er alt, sum tað skal vera, og sluppin er útleigað nakrar ferðir árliga og ger felagið annars eisini túrar. Dekkið er júst kalfatrað og Johanna er siglingarklár.

Á Jóansøku verður lív í aftur umborð á Johonnu. Har verður café og leygardagin fæst fiskasuppa umborð á Johonnu.

Sunnudagin verður rættiliga gjørt burturúr. Tá ber til at sigla ein túr við Johonnu út á Grønirnar (á Vágsfirði, blðm), og umborð fáast kaffi og køkur og harmonikan spælir. Túrurin tekur umleið ein tíma og fleiri túrar verða gjørdir, um fleiri tekna seg til og grundarlag er fyri tí.

# Hjallurin er í sjónum ...



Vágbingar eru av lyndi skemtingarsamir og ofta eru teir kvikir í orð og tal, so tað situr væl, júst sum tað skal. Soleiðis var eisini, tá ein vágbingur sá hesa sjónina í ósanum í Vági. Lítil løta gekk, so vóru vælkendu orðini úr einum sangi sungin við argandi rødd; Og hjallurin er í sjónum...

# Løgmaður á jóansøku


*Løgmaður avmyndaður, meðan hann heldur røðu í Vági og á jóansøku fer Jóannes Eidesgaard at halda røðu fyri studentum og at handa steyp eftir kappróðurin*

*Mynd:D.Olsen*

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, verður jóansøkugestur í Vági í ár og hann er ikki ørindaleysur**

LØGMAÐUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard verður á jóansøku í ár. Løgmaður skal sjálvsagt ikki bert taka sær av løttum. Hann skal halda røðu, tá pisufundur verður við Minnisvarðan fríggjadagin klokkan 19:00. Rakul Borg heldur røðu vegna studentarnar.

Vanligt hevur seinnu árini verið, at pisufundurin fylgir jóansøkuni, ið sum kunnugt er skiftivís á Tvøroyri og í Vági.

Leygardagin klokkan 15 byrjar FM kappróðurin og løgmaður sleppur ikki so, tí eftir kappróðurin leygardagin verður tað løgmaður, ið handar steypini.